


*Jan Hentze, sølumaður hjá P/F Meinhardt Arge við ábyrgd fyri Peugeot bilunum, sigur, at 307 SW verður her tíðliga í mai mánaða. Her er hann við einum Peugeot 307 XS 2.0*

# Peugeot 307 - stationvognur við upp til 7 sitiplássum

**Síðan Peugeot 307 kom á marknaðin í fjør, hevur sølan av bilinum gingið av-bera væl. Nú kemur stationvognurin, 307 SW, á marknaðin. Talan er um ein bil, sum kann hava upp til 7 sitipláss. Tað, at meira enn helvtin av takinum er glas, gevur sera gott útsýni og ljós inni í bilinum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Peugot 307 SW er bygdur yvir sama plattform sum hatchback útgávan, men aksilfrástøðan er 10 cm longri. Kabinan er innrættað við trimum baksetrum og møguleika fyri tveimum setrum á aftastu rekkju, soleiðis at bilurin kann hava tilsamans 7 sitipláss.

## Trygdin

Bilurin verður gjørdur við 1.6 og 2.0 litur bensinmotorum við 109 og 138 hk og 2.0 litur HDi dieselmotori við 90 ella 110 hk við FAB sótfilturskipan. Trygdarskipanin er eisini umfatandi við ESP, (elsktronisk stabilitet program) EBA bremsuassistent, aktivum nakkapútum og seks airbag. Allar útgávurnar hava 16" alufelgur.

## Laminerð glastak

Setrini á aftastu rekkju, ið kunnu keypast sum eykaútgerð, eru best egnaði til børn og ung upp til 13/14 ár. 307 SW er sermerktur av at meira enn helvtin av takinum er laminerað glas. Tað vil siga at glastakið byrjar har sum forrúturin endar. Hetta gevur gott ljós inni í bilinum og gott útsýni til tey ferðandi. Um sólin er ov sterk, kunnu elektrisku sólgardinurnar koyrast fyri, so ljósið ikki sleppur inn tann vegin.

## Station og MPV

Peugeot 307 SW er ein nýggj modelltypa, ið sameinir ein stationvogn og ein MPV í sama bili. Bilurin er ein 5+2, har tey aftastu setrini kunnu flytast runt í bilinum eftir egnum ynski á teimum fimm Quickfix monteringstøðunum í kabinuni. Jan Hentze, sølumaður hjá Meinhardt Arge, sigur, at teir fyrstu bilarnir vera her tíðliga í mai.



*Sum eykaútgerð kunnu keypast setur til aftastu rekkju, so bilurin fær 7 sitipláss*




*Peugeot 307 SW er ein sera snøggur bilur, ið er 22 cm longri enn hatchback útgávan*




*Meira enn helvtin av takinum er laminerað glas. Um sólin er ov sterk, kunnu elektrisku sólgardinurnar koyrast fyri, so ljósið ikki kemur inn tann vegin*



# Saab 9-3 turbo Jubileum - kvikur luksusbilur

**Í sambandi við at 25 ár eru liðin, síðan Saab byrjaði framleiðsluna av bilum við turbomotorum í 1977, hava teir fingið nakrar Saab 9-3 turbo jubileumsbilar heim. Talan er um vælútgjørdar luksusbilar til ein góðan prís**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Saab hátíðarhilda at tað vóru liðin 25 ár síðan teir fóru undir at framleiða bilar við turbomotorum. Útrokningar vístu, at ein 4 syl. turbomotorur vigaði 50 kg minni enn ein 6 syl. motorur við somu hestakreftum og hevði 30 prosent minni bensinnýtslu. Á bilasøluni hjá Meinhardt Arge, ið nú umboða Saab, hava teir í hesum døgum nøkur sera góð tilboð av Saab 9-3 jubileumsbilum.

## Frá 0-100 km/t uppá 8,5 sek

Motorurin er ein 2.0 litur 16V turbo við 150 hk. Teir eru m.a. útgjørdir við leðursetrum, leðurratti, aircondition, 16" alufelgum og fart piloti. Bilurin, ið er ein luksusbilur við sera góðari kraft, er ein uppliving at koyra. Hann koyrir frá 0-100 km/t uppá 8,5 sek, ið má sigast at vera sera gott.




*John Vilhelm, sølumaður hjá P/F Meinhardt Arge við ábyrgd fyri Saab, er her við einum Saab 9-3 jubileumsbili. John hevur selt Saab bilar síðan fyrst í sjeytiárunum*

## Gingið á odda

Tey, sum koyra við Saab, dáma væl tann haldgóða svenska kvalitetin og tær øðrvísi og væl umhugsaðu loysnirnar, ið Saab eru kendir fyri. Bilarnir hava allar sínar persónligu eginleikar í varðveitslu, hóast General Motors hava keypt verksmiðjuna. Saab hava eisini gingið á odda, og hava verið fyrimyndir hjá øðrum bilverksmiðjum, innan trygdarskipanir í bilunum





*Innan eru leðursetur, leðurratt og aircondition*

## Saab 9-3 turbo Jubileum 2.0t

Motorurin: 2.0 litur 4 syl. turbo 150 hk

| | |
|---|---|
| 0-100 km/t | 8,5 sek. |
| Bensinnýtsla | 11,8 km/l |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 463,0 cm |
| Breidd | 171,0 cm |
| Hædd | 143,0 cm |
| Eginvekt | 1350 kg |
| Viðførisrúm | 494 litrar |
| Prísur | Kr. 274.400 |

Søluumboð:
P/F Meinhardt Arge
við Oyggjarvegin
FO-110 Tórshavn
Tel.345400